Marknaðardagur:

# Kjøt og ull í Sjónleikarhúsinum

**Leygardagin 4. mars skipa Bóndafelagið og Meginfelag Búnaðarmanna fyri marknaðardegi í Sjónleikarhúsinum, har bøndur og onnur fara at vísa fram, hvat fæst burtur úr landbúnaðinum í Føroyum. Á tiltakinum fara MBM, Tøting og Sirri eisini at sýna fram sínar vørur**

MARKNAÐARDAGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Klokkan 10 leygarmorgunin komandi letur Sjónleikarhúsið í Havn upp til áhugaverdan og forvitnisligan marknaðardag, har høvið verður at síggja – og smakka – hvat er at fáa á gørðunum runt um í Føroyum.

Á marknaðardegnum, sum varar frá klokkan 10-18, verður eisini kunnað um landbúnað, skanning av seyði, føroysku ullina og um vinnuligan landbúnað í Føroyum í 2015.

Til undirhalds verður eisini vísusangur, eins og MBM, Tøting og Sirri fara at sýna fram sínar vørur.

Ongum nýtist at gagna svangur í Havn leygardagin, tí gjøgnum dagin kunnu fólk eisini keypa smyrjibreyð við føroyskum viðskera í Sjónleikarhúsinum.

### Fjølbroytt skrá

Dyrnar verða latnar upp kl. 10, og klokkan 11 fer Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu, at tosa um vinnuligan landbúnað í Tórshavn.

Klokkan 12 og klokkan 15 fer Eyðstein Jensen at skanna seyð, og hetta eru sonevndar fosturskanningar.

Mótasýning verður klokkan 13 og klokkan 17, og tá fara MBM, Tøting og Sirri at sýna fram sínar vørur.

Klokkan 14 fer Nicolina Beder at tosa um føroysku ullina, og klokkan 16 verður vísusangur.

Aftrat vanligu skránni, fara Bjarni Djurholm, landsstýrismaður og Hendrik Old, løgtingsmaður, at hugleiða um vinnuligan landbúnað í Føroyum í 2015.

### Aðrir luttakarar

Aðrir luttakarar á marknaðardegnum í Sjónleikarhúsinum verða Búnaðarstovan, Búnaðargrunnurin og Royndarstøðin.

Á marknaðardegnum verður eisini høvi at síggja, meðan arbeitt verður við hornum og roði.



*Á forvitnisligum marknaðardegi í Sjónleikarhúsinum leygardagin verður høvið at síggja, hvat er at fáa á gørðunum kring landið*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Væntandi verður Atlantic Navigator aftur at síggja í Ánunum um fáar dagar*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Atlantic aftur fullur

**Tað hevur gingið væl hjá Atlantic Navigator at fiska hendan túrin, og alt bendir á, at framleiðslan umborð eisini hevur gingið rættiliga væl**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Um fáar dagar kemur Atlantic Navigator væntandi aftur til lands við fullari last av surimi og mjøli.

Hetta hevur verið ein stuttur túrur hjá skipinum. Væl hevur gingist at fiska, og alt bendir á, at framleiðslan umborð eisini hevur gingið rættiliga væl.

– Vit hava 1200 tons inni, og ætlanin er at fiska tveir dagar aftrat.

Hesi vóru tíðindini, sum frættust av skipinum týsdagin.

Sum skilst, hevur manningin, tá ið best hevur ligið fyri, fingið heilt upp í 100 tons av lidnari vøru í lastina um samdøgnið.

Og tað er óført!

Mangt bendir á, at verkætlanin við flaggskipi norðoyinga, Atlantic Navigator, rættiliga er farin at síggja spennandi út.

# Nógv fleiri ferðast um Vága Floghavn




*Fleiri og fleiri ferðast um flogvøllin í Vágum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Higartil í ár er talið av ferðafólki, sum hava ferðast um flogvøllin í Vágum, økt við 15,2% í mun til somu mánaðir í fjør**

FERÐING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Talið av ferðandi um Vága Floghavn er rættiliga nógv størri higartil í ár enn somu tíð í fjør.

Sambært hagtølum hjá Vága Floghavn ferðaðust tilsamans 9.597 fólk um flogvøllin í Vágum í februar í mun til 7.994 í februar mánaði í fjør.

Hetta svarar til ein vøkstur upp á heili 20,1%.

Vága Floghavn sigur, at framgongd hevur verið á øllum farleiðum undantikið við tyrluni, har flutningurin hevur verið nakað minni í februar í ár enn í fjør.

Hyggja vit at teimum báðum fyrstu mánaðunum í ár undir einum, er ferðafólkatalið um floghavnina tilsamans 20.801, sum er 15,2% fleiri enn sama tíðarskeið í fjør.

Higartil í ár eru tilsamans 744 flogfør komin og farin um floghavnina, og hetta er 16,1% fleiri enn somu tíð í fjør.

Í februar var talið av flogførum, sum komu og fóru, 352, og tað er 13,9% fleiri enn í februar í fjør.